# E - og tónleikurin



## Oddvá Nattestad, samskipari av Listastevnuni

*Kemur tú úr einum heimi við ljóðføri?*
– Nei, tíverri.

*Spælir tú nakað ljóðføri?*
– Nei.

*Syngur tú undir brúsuni?*
– Ja, í løtuni er tað úr sangleikinum um Jósef og ótrúliga dreymakotið.

*Hevur tú nakrantíð droymt um at gerast tónleikari?*
– Nei.

*Hvat hevur tónleikur at siga fyri teg?*
– Nógv - millum annað kann hann venda einum ringum degi til ein góðan dag.

*Hvussu nógvar fløgur/plátur/bond eigur tú?*
– Gott og væl 200 single/ep plátur, umleið 170 LP plátur og ein dunga av bondum og fløgum

*Hvat er tín yndisfløga?*
– Song...Tread Lightly hjá Palle Mikkelborg.

*Hvørja fløgu hevði tú ikki viljað átt, um tú so fekst pengar afturfyri?*
– Týsku »Anti-Christ« við millum annað Bruno Kamm.

*Hvør sangur skuldi ongantíð verið skrivaður?*
– Mín dingeling...

*Hvat er tann pínligasta plátan, sum tú eigur?*
– Auf Wiedersehn, Mallorca

*Hvønn sang hevði tú valt, um tú skuldi sungið karaoke?*
– Sangin Que Sera, sum Doris Day sang í einum filmi frá 50´unum.

*Hvat er tann besti tónleikurin til eitt hugnaligt kvøld?*
– Tónleikur við Frank Sinatra/Dean Martin.

*Hvønn tónleik vilt tú helst hoyra sunnumorgun?*
– Enskan kórtónleik.

*Hvør tónleikur fær teg í ringt lag?*
– Larmandi tónleikur um morgunin.

*Hvør sangur kann fáa teg út á dansigólvið?*
– Tango Jalousi.

*Hvat er tann fyrsti sangurin, sum tú minnist teg dáma?*
– Føroyska Rasmus og Robertino við O Solo Mio.

*Hvønn sang ert tú fegnast um at hava verið við til at gjørt ella spælt inn?*
– Havi ongan sang spælt inn...

*Hvør sangur skal spælast til tína jarðarferð?*
– Eg kundi hugsað mær, at Eivør sang: Eg skar mítt navn í grein ta hvitu.

*Hvat er tann besta konsertin, sum tú hevur verið til?*
– Tann við Týr og Runrig var ótrúliga góð, Teitur, Eivør, Enekk, Frændur og ikki at gloyma Jethro Tull fyri einum mánaði síðani í London.

*Hvønn tónleikara hevði tú viljað hitt?*
– Walisiska operasangaran Bryn Terfel.

whazzzup!!!

Forrige · Næste · Svar · Svar alle · Videresend · Flag · Udskriv · Rediger · Slet · Ombryd igen · Udkast

### TELDUBRÆVIÐ

Frá: Eyðun Nolsøe, eydunnolsoe@hotmail.com
Til: post@sosialurin.fo
Evni: Vikuskifti

## Eivør á Oyrasundi

Stórur áhugi var millum føroyingar og íslendarar undan tiltakinum við Eiðvør Pállsdóttur seinasta leygarkvøld í salinum á Oyrasundskollegiinum. Gravgangur var eftir billettum og konsertin var eisini útseld. Umstøðurnar í hesum hølunum til live framførðslur eru bara næstbest. Ljóðanleggið sigur ikki nokk og konsertin við Eiðvør var tíverri onki undantak. Tað skuldi vísa seg at vera trupult at fáa ljóðgóðskuna upp á eitt nøktandi støðið. Vokalurin hoyrdist ikki nóg væl og alt ljóðbílætið var nakað ullint. Ikki tí, Eiðvør og hennara menn spældu væl og livdu seg inn í framførðsluna. Eisini riggaði sera væl við livandi myndum á stórskýggja aftanfyri orkestrið, har vístar vóru m.a. nærmyndir av orkesturlimun. Eiðvør framførdi eina blanding av sínum egna tilfarið við sansi fyri dramatikki og stemningi. Improvosatiónirnar hjá henni eru heilt fantastiskar og hon kann nakað við røddini út yvir tað vanliga. Av tí at ljóðgóðskan ikki stóð mát við framførðsluna, hevði hon trupult við at halda fast í áhoyrarnar. Sostatt var nógv prát og vas undir konsertini. Hetta er óvanligt fyri Eiðvør, sum hevur tað við at trøllabinda sínar áhoyrarar. Hon var eisini sera ónøgd við avrikið hjá fyrireikarunum á ljóðsíðuni eftir tiltakið. Ljóðmaðurin megnaði ikki sína uppgávu og tað gongur beinleiðis útyvir framførðsluna hjá orkestrinum. Hóast Eiðvør var nervað av hesum, framførdi hon tilfarið sera professionelt og á einum høgum støði. Tó gjørdist onkur sangur styttri enn vanligt og heldur ikki kom bólkurin aftur á pallin at framføra nakað eykalag. Lógvabrestirnir eftir seinasta lag bóru annars boð um, at tað var júst tað áskoðarnir ynsktu sær. Men Eiðvør hevði fingið nokk og tímdi ikki meir. Seinni gjørdist lagið tó betur í einum hugnaligum afterparty og á kollegiinum var óførur rómur á fólki. Eiðvør er heilt einfalt eitt upplivilsi á pallinum óansæð og onki ljóðanlegg kann drepa hennara magiska talent. Alt í alt eitt frálíkt kvøld á Oyrasundi við Eiðvør sum mið- og hæddarpunkt. Tað verður tó helst seinur dagur til vit síggja hana aftur á hesum pallinum, til tess var arbeiðið hjá fyrireikarnum ikki nóg gott, tíverri.



# Pedagogar til Dagstovnin á Argjum

Søkt verður eftir tveimun pedagogum til vøggustovurnar, tað eina starvi er at byrja 1. juni og hitt at byrja 1. august 2004, ella eftir avtalu. Arbeiðstíðirnar eru 30 ella 40 tímar um vikuna.

Dagstovnurin er ein sjálvsognarstovnur við eini 5 manna nevnd, har trý eru politiskt vald og tvey eru foreldravald umboð.
Á Dagstovninum á Argjum eru tvær vøggustovur og fýra barnagarðar, har tann eina barnagarðsstovan er forskúli.

**Umhvørvið rundanum Dagstovnin á Argjum**
- Beint við er hagin við alskyns møguleikum
- Sandá rennur framvið, og Sandágerð er tætt við
- Bussleið 2 steðgar við stovnin

**Stovnurin leggur dent á at bjóða**
- Ein pegagogik, har dentur verður lagdur á menning og avbjóðing
- Virðing og trivnað, bæði hjá børnum og vaksnum
- At stovnurin er opin og jaligur um framtíðina og broytingar
- Forskúla og gott samstarv við skúlan

**Hví trívast starvsfólkið á stovninum**
- Tí at vit fáa fakliga mennandi avbjóðingar
- Tí at vit sjálvi eru við til at seta dám á stovnin
- Tí at vit hava 12 børn í bólkinum og kunnu yvirskoða arbeiðsuppgávuna
- Tí at arbeitt verður við trivnaði, dygd og menning

**Hvat kunnu vit bjóða tær**
- Eitt starv, har tú kanst hava ávirkan
- Eitt starv, har tú kanst nýta tínar dygdir og samstundis menna teg sjálva(n)
- Eitt starv, har vit líta á teg, so tú kanst arbeiða sjálvstøðugt
- Eitt starv, har dentur verður lagdur á opinleika

**Afturfyri krevja vit av tær**
- At tú hevur námsfrøðiliga útbúgving
- At tú hevur fakliga vitan, sum kann nýtast í dagliga arbeiðinum
- At tú trívist við at arbeiða sjálvstøðugt
- At tú hevur góð samstarvsevnir
- At tú ert framfýsin

**Setarnartreytur**
Løn eftir sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið

Nærri fast at vita um starvið við at venda sær til Gudrun Winthereig Rasmussen, leiðari, á telefon 219019, ella at ringja 319019 lokal 10.

Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi leygardagin 24. apríl 2004

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## ÚTBJÓÐING

Tórshavnar kommuna bjóðar hervið um- og útbygging av Kollafjarðar skúla út í almennari arbeiðstøku.

Arbeiðið umfatar at útbyggja skúlan við tilsamans umleið 950 fermetrum, umframt umbyggingar av verandi skúla.

Byggingin verður boðin út í fakarbeiðstøkum:

**A. Inniloking**

**B. Gólvarbeiði**

**C. Málaraarbeiði**

**D. HVS- og ventilatiónsarbeiði**

**E. El-arbeiði**

Útbjóðingartilfarið kann bíleggjast hjá MAP Arkitektum á tlf. 351900 innan 2. apríl móti veðhaldi á 20.000 kr, sum verður at gjalda á konto í Føroya Banka nr. 6460 168.128.3.

Viðmerkjast skal, at arbeiðsfrágreiðingar verða útflýggjaðar á fløgu. Frágreiðingarnar kunnu lesast við telduforritinum Acrobat Reader. Allar tekningar eru tó á pappíri.

Lisitatiónin verður fríggjadagin 14. mai kl. 14 í býráðssalinum. Tey, sum boðið hava, kunnu vera hjástødd, tá ið boðini verða latin upp.

**Høvuðsráðgevi og projektleiðsla:**

MAP Arkitektar sp/f, Niels Finsens gøta 31, FO 100 Tórshavn

**Konstruktiónir:**

Sp/f Verkfrøðingastovan FRI, Mannbrekka 18, FO 100 Tórshavn

**HVS og ventilatión:**

P/f Sofus M. Jakobesen FRI, J.H. Schrøters gøta 22, FO 100 Tórshavn

**El:**

KJ- Elráð, Undir Brúnni 30, FO 700 Klaksvík

SNARSKIVAN

# Bilar til sølu

**SsangYong Rexton RX290 4WD *"7 setur"***



prísur 290.000,-

· Árgang 2003 · km 22.500 · Aut. gear · 2,9 Turbo diesel intercooler · Automatiska í- og úrkoblan av 4WD · Centrallás · Fjarstýrdan lykil · Tónaðar rútar · Krók · Lættmetalfelgur við dekkum · Pioneer anlegg við fløguspælara · Vælhildin

Sosialurin 341800

**Citroen Jumpy 2,0 TD Vørubilur**



prísur við mvg 120.000,-

· Árgang mai 1998 · Km 80.000 · Radio, el-rútar, nýlakkeraður, í sera góðum standi.

**Renault Mégane 1,6 Coupé**



prísur 49.500,-

· Árgang 1996 · Km 149.000 · 1,6 bensinmotor · Summardekk á sportfelgum · Radio og píkadekk fylgja við.

BILVERKSTAÐIÐ
v/ H.J.Kollsker · á Hjalla · Tlf 31 10 13
Tlf 51 10 13 · Boks 3262 · FO-110 Tórshavn
www.kollsker.com

## Kranaskeið D

8 – 25 TM

byrjar mánadagin 29. mars kl. 19.15

Tilmelding á tel 318821 ella tel 218777

Spf. KOYRIKORTIÐ
Slættanesgøta 5 • tel 31 88 21 og tel 21 87 77

Sosialurin 341800

# Opel Omega 2500 TDI til sølu



Tel 31 16 01 ella 21 66 60

Sosialurin 341800

# Eysturoyingar

## Eysturoyar Teoriskúli

**Nýtt teoriskeið byrjar mánadagin 29. mars**

**Tilmelding hjá:**
**Hugo Kristiansen, tel 225225**

Sosialurin 341800

Sosialurin
www.sosialurin.fo